# Tann stóri toskurin er feitur



*Sjúrður Joensen, útróðrarmaður av Skála, gjørdi ein góðan dag týsdagin. Hann hevði heili 4.000 pund á 16 stampum!*
*- Tann stóri toskurin er bæði feitur og góður, sigur hann.*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

**- Tað líkist ongum, at kassar ikki skulu vera til fiskin. Hetta ger, at fiskurin ikki verður skildur, og harvið verður prísurin lægri, sigur Sjúrður Joensen, útróðrarmaður á Skála**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*

Hjá einum tíðindamanni við áhuga fyri fiskivinnuni, kann tað saktans loysa seg at vitja ein túr oman á bryggjuna, tá ið bátar koma aftur av útróðri og skip liggja og landa. Ert tú heppin, fært tú eina kenslu av, hvat rørist ímillum útróðrarmenn, fiskimenn og reiðarar beint nú. Onkur landari, sum koyrir truck, rópar kanska eisini á teg og hevur eitthvørt at siga.

### Torleif og Sjúrður

Soleiðis var týsdagin í vikuni, tá ið eg gekk framvið við myndatólinum.

Á veg heim av blaðredaktiónini í Saltangará steðgaði eg fyrst við maskinverkstaðin, Mekanik í Runavík, har eini trý skip lógu fram við bryggjukantinum.

Eitt av hesum skipum, er línuskipið, Pison úr Klaksvík.

Komin út á Toftir og oman á bryggjukantin frammanfyri Fiskamarknaðin, møtti eg reiðaranum á Pison, Tórleifi Sigurðsson. Hann spákaði sær fram við nøkrum fiskakassum hjá útróðrarmanninum, Sjúrða Joensen av Skála, sum júst var komin aftur av útróðri.

Torleif segði, at Mekanik hevði Pison til árligt eftirlit, og serliga er tað maskinan, sum skal eftirhyggjast

Hann nevndi hýsuprísin, sum var rættiliga lágur hendan dagin - so lágur, at Torleif tosaði um sonevndar minus prísir, sum standast av, at tann smáa hýsan fer fyri nógv minni enn minsta prísin, ið skipini áseta.

### Góður útróður

Vit høvdu eisini eitt lítið prát við útróðrarmannin, Sjúrð Joensen av Skála, sum rør út við glastrevjabátinum, Falkinum.

Sjúrður hevur róð út burtur av í hálvt annað ár, men fyri ta tíð var hann sjómaður.

Einsamallur hevði hann verið eystanfyri við línuni og hevði gjørt ein góðan dag - 4.000 pund av toski og hýsu á 16 stampum!

Tað er óførur útróður.

Sjúrður fýltist á kassatrotið, sum er og segði, at hetta gongur útyvir fiskaprísin, tí ov lítið er av kassum at skilja fiskin uppí.

Eg vísti á, at Sosialurin hevur skrivað um hendan trupulleikan fyrr í ár. Tá tosaðu vit bæði við Fiskamarknaðin og við stjóran á Kassamiðstøðini.

Fiskamarknaðurin ásannaði, at kassatrotið var ein stórur trupulleiki - serliga í vár, meðan stjórin á Kassamiðstøðini var meira trekur at viðganga, at ov fáir kassar eru í landinum. Hann helt fyri, at tað er við kassunum sum við Smyrli.

- Skal Smyril altíð vera nóg stórur, skal hann vera ógvuliga stórur, sum hann tók til.

Kassamiðstøðin keypir fiskakørini úr Íslandi, og fyrr í summar skiltist, at tann stóra og umtalaða bíleggingin haðani var komin í hús.

Men sambært Sjúrða er framvegis okkurt, sum haltar við hesi skipan; antin er talið av kassum og kørum og lítið - ella virkar skipanin ikki, sum hon skal.

### Feitur toskur

Sjúrður Joensen letur annars væl av útróðrinum.

- Tað er nógvur fiskur at fáa, tá ið roynandi er.

Týsdagin, tá ið Sosialurin datt fram við, var slagið umleið helvtarbýtt, toskur og hýsa.

Sjúrður dróg nakrar stórar toskar fram í kassanum, meðan eg og Torleif hugdu at.

- Tað skerst ikki burtur, at tann stóri toskurin er bæði feitur og góður, legði hann dent á.

Sjúrður Joensen væntaði annars, at prísirnir á hýsu munnu fara at hækka seinni í vikuni, tá ið meira hýsa helst verður keypt til beinleiðis útflutnings.




*Á bryggjuni frammanfyri Fiskamarknaðin á Toftum møttu vit eisini Torleifi Sigurðsson, reiðara.*
*- Hýsuprísurin er ógvuliga lágur í løtuni, sigur hann.*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*



*Millum skipini, sum liggja við bryggjukantin frammanfyri maskinverkstaðin, Mekanik í Runavík, er línuskipið Pison úr Klaksvík.*
*- Skipið er til árligt eftirlit, og tað er serliga maskinan, sum verður eftirhugd, sigur reiðarin.*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*



# Grindadráp kosta arbeiðspláss



*Carl á Lag, stjóri í altjóða fiskafyritøkuni SN Global, saknar eitt opið kjak um, hvørt føroyingar vilja gjalda prísin fyri at drepa grind*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Grindadráp er ein vaksandi trupulleiki fyri føroyingar. Tað er vorðið torførari at selja føroyskar vørur uttanlands, tí tær verða útihýstar á stóru marknaðunum. Hetta kann kosta nógv føroysk arbeiðspláss við tíðini, sigur Carl á Lag, stjóri í stóru fyritøkuni SN Global**

GRINDABOÐ
*Ingi Rasmussen*

Hvussu nógv vilja vit offra fyri at sleppa at drepa grind?

Við hesum hárhvassa spurningi verður stungið hol í eitt eymt tabuevni hjá føroyingum.

Tað er Carl á Lag, stjóri í altjóða fiskafyritøkuni SN Global, sum førir hvalváknið.

Skulu vit tvíhalda um okkara aldagamla grindadráp, hóast tað fær avleiðingar fyri bæði fiskavirki, arbeiðspláss og okkara heilsu?

Carl á Lag saknar eitt sakligt, fordómsfrítt og opið orðaskifti í Føroyum um grindadráp og tess avleiðingar fyri fiskafyritøkur og harvið føroyingar.

Hann sigur ikki beinleiðis, at vit eiga at gevast at drepa grind, men hann heldur, at føroyingar eiga at gera sær greitt, at grindadráp forðar okkum í at virka á jøvnum føti við onnur á stórum marknaðum í Evropa.

### Útihýsa føroyskt

Evropeiski marknaðurin hevur eftir øllum at døma fingið nokk av føroyingum.

– Tað vísir seg, at vit als ikki sleppa av við føroyskar laksaportiónir í t.d. Týsklandi, tí brúkarin ikki vil keypa føroyskt longur. Og líkt er til, at hetta breiðir seg til onnur fiskasløg eisini. Hetta hevur onki við tjóðskap at gera, men verðin rundan um okkum er ímóti føroyskum grindadrápi. Hví skal brúkarin so keypa føroyskt, tá hann fær somu vørur úr eitt nú Noregi og Kili? spyr Carl á Lag.

Hetta er ikki hvør sum helst fyritøka, sum kærir sína neyð. Umsetningurin hjá SN Global konsernini er umleið 4.000 milliónir krónur. Móðurfelagið heldur til í Japan, og tilsamans starvast 3.000 fólk í fyritøkuni. Evropeiska høvuðssætið er í Føroyum, her fyritøkan hevur verið síðstu fimm árini. Føroyska felagið hevur dótturfeløg í bæði Fraklandi og Týsklandi, og systirfeløg eru at finna bæði í USA, Kili og Japan.

### Miðvís ætlan

Tað er á størstu marknaðunum hjá føroyingum í Evropa, at størstu trupulleikarnir eru.

Carl á Lag sigur, at enskar handilsketur hava ein niðurfeldan politikk um ikki at keypa føroyskar vørur, og stóru týsku handilsketurnar útihýsa somuleiðis føroyskar vørur.

– Størsta týska handilsketan ALDI er dømi um ein stóran avtakara av lidnum fiskavørum, men hon krevur, at tað mugu ikki vera føroyskar vørur ímillum. Í staðin noyðist man so at selja t.d. norskar vørur til ALDI, og tá er ongin trupulleiki, sigur Carl á Lag.

### Kostar arbeiðspláss

Lidnar føroyskar laksavørur verða sostatt útihýstar frá teimum stóru marknaðunum. Og avleiðingin av grindadrápinum er ræðandi, sambært Carl á Lag.

– Føroyingar noyðast at selja sín laks sum rávøru til eitt nú Danmark og Frakland, ið so virka vøruna lidna. Hetta er ein stórur trupulleiki, sum ger, at vit ikki koma víðari við at menna laksavirkini í Føroyum, sigur hann.

Sambært Carl á Lag dragast fleiri føroysk virki longu nú við avleiðingarnar av, at vit tvíhalda um grindadrap í Føroyum. Okkurt er longu við at stongja partvíst av hesum ávum, og onnur arbeiðspláss rúka helst í kjalarvørrinum.

–Vit eru noydd til at gera okkum greitt, hvat grindadráp kostar okkum, og síðan mugu vit taka eitt neyðugt kjak um avleiðingarnar. Er grindadráp so nógv vert fyri okkum, at vit missa arbeiðspláss, vælferð og fáa verri heilsu? spyr Carl á Lag.

Vit senda spurningin víðari til teir føroyingar, sum enn eta grind.




Sosialurin
www.sosialurin.fo